VØRN
MRCC TÓRSHAVN

25. feb 2019

Svar frá  MRCC Tórshavn

Áheitan um ummæli av løgtingslógaruppskoti um yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki og løgtingslógaruppskot um reglur um sjóuppmerking.

1. Tann myndugleiki, sum fær ábyrgdina av avmerkingarøkinum, má hava tann kravda serkunnleikan, sum er neyðugur til at áseta ljósstyrki og aðrar eginleikar á nýggjum ljós avmerkingum.
2. Tað ritið, sum kemur í staðin fyri "Efterretninger for søfarende", má vera klárt frá fyrsta degi. Í tað ritið fara allara siglingarávaringar, sum koma at vera galdandi í langa tíð og tær ávaringar, sum eru soleiðis háttaðar, at ein rætting í viðkomandi korti er neyðug. Fyrst vera tær lisnar út vanligum VHF rásum, MF, Navtex og ofta einaferð í útvarpinum eisini. Tá ið tær eru lisnar upp eina tíð, vera tær almannakunngjørdar í "Efterretninger for Søfarende", og tá verður steðgað at senda tær út á radio og Navtex.
   Siglingarávaringar sum eru galdandi í langa tíð skulu eisini almannakunngerðast  í "Notice to Mariners", sum UK Hydrographic Office gevur út.

Tað er skylda hjá skipum at seta seg inn í hvørjar siglingarávaringar eru galdandi í einum øki, og tí skulu ávaringarnar eisini lýsast í hesum ritum

Vinaligast

Edvard Bjarnason
MRCC Tórshavn
Tinghúsvegur 64
Tel.: +298 351302, e-mail: manager@vorn.fo

VØRN